Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Minningarorð um Bjarta Mortensen

**føddur 18. august 1962 deyður 23. mars 2003**

Bjarti og eg komu at kennast, tá hann eftir lokna skúlagongd tók leiðina oman á kaina og kom at starvast hjá okkum í 1978.

Her var Bjarti við til at leggja enn betri lunnar undir eina fyritøku í menning. Hetta tíðarskeiðið var merkt av framgongd og arbeiðsplássið var um hesa leið merkt av eini góðari blanding av eldri og yngri starvsfólkum.

Stefanus, Lakk, Bjarti og Chris løgdu tónan an.

Tónin var skemtingarsamur og góður og var viðvirkandi til at strævnir dagar gingu lættari.

Nú tá hetta tíðarskeiðið er lagt afturum, so kunnu vit goyma arbeiðsløtur og farnar starvsfelagar í hjørtum okkara, men til ber at taka løturnar fram aftur til minnis og skemtanar tá høvi býðst. Um minnið bilar, ber til at taka videotólið hjá Chris til hjálpar.

Sum hjá øðrum og í tíðarandanum so var eisini hjá okkum neyðugt at gera eina arbeiðsuppdeiling.

Bjarti og eg vóru felags um at stíla fyri og lyfta uppgávuna at avgreiða tey farmaskip, sum fyritøka okkara hevði um hendi. Tíðarskeiðið frá 78 til 92 var ikki langt sæð í tíðarinnar perspektivi, men innan okkara arbeiðsøki hendi nógv.

Farmaskipini vitjaðu oftari á Tvøroyri tá,i kki vóru tey stór, men hóast tað og kanska nettup tí var uppgávan at loysa somikið størri og torførari.

Bjarti fekk um endan av tíðarskeiðnum við „Rúnatindi" og „Nestindi" og var við tá "Líðartindur" setti hol á eina heilt nýggja tíð.

Haldi eg kann siga at uppgávan, sum var litið mær og Bjarta í hendi hesi ár, væl og virðiliga varð loyst.

Eftir loknan arbeiðsdag, sum mangan kundi vera langur, hevði Bjarti sjálvandi síni egnu áhugamál.

Niels og Dagmar Mortensen vóru brennandi T.B.-stuðlar eins og tey á Hamri og var hetta óivað borið víðari til abba- og ommubarn teirra, Bjarta.

Bjarti var tó eitt sindur meira internationalur og valdi sær umframt T.B. eisini Liverpool til heimalið sítt.

Tey komandi nógvu ungdómsár vóru T.B., Liverpool, rokkbólkurin Queen og hugnalig samvera við kammeratar ovast á breddanum hjá Bjarta. Eisini her eru



nógvar góðar og ógloymandi løtur at minnast afturá. Gullárini hjá T.B., Liverpool og Queen.

Bjarti hevði óivað góð og stuttlig ungdómsár í tryggum heimligum umhvørvi, men tað, sum vantaði í, fann hann saman við Sonny. Eitt stórt umskifti hendi hesi næstu ár í hansara lívi, men tíverri ikki bara til tað betra.

Samanhald gevur styrki og var hetta avgerandi fyri at Bjarti hóast sjúkur fekk góð ár saman við Sonny.

Okkara gerandisdagur gekk framvegis við fúkandi ferð, men hjá Bjarta mundi gerandisdagurin mangan tykjast langligur og seinførur. Gott at Sonny var har og at hann hevði eina kjarnu av vinfólki at styðja seg til. Bert fyri at nevna ein. Jean Dimon. Takk fyri tað.

Tá Bjarti fekk keðiligu boðini um at skurðviðgerðin var miseydnað, tók hann ta djarvu, men greiðu støðu, at nú vildi hann heim. Í heimligun umhvørvi vildi hann taka støðu til hvat víðari skuldi henda. Bjarti var ótrúliga róligur og avkláraður og hartil sterkur í síni trúgv. Vónaði til tað síðsta, men var realist og visti hvønn veg tað bar.

Eftir fáar dagar heima andaðist Bjarti bert 40 ára gamal.

Ærað veri minnið um mín góða vin og arbeiðsfelaga Bjarta Mortensen.

**Henrik**



## Willi Olsen sølumaður hjá Arctic Import Føroyar

1. apríl varð Willi Olsen, í Hósvík, settur í starv sum sølumaður hjá Arctic Import Føroyar. Willi er 26 ára gamal og hósvíkingur, sonur Estrid, f. Hansen, úr Hósvík og Magnus Olsen, ættaður úr Funningi.

Willi hevði kiosk í Hósvík, áðrenn hann fór á Føroya Handilsskúla, har hann tók HH prógv í 1999. Hann bleiv útbúgvin sum bankaatstøðingur í Føroya Banka í 2002. Hann er giftur við Daniellu, f. Budure, úr Jebel í Rumeniu, og tey eiga sonin Andrew.

Arctic Import er ein handils- og tænastufyritøka, sum leggur seg eftir at vera ein samstarvsfelagi hjá vinnulívsfólki og almennum fyritøkum í Grønlandi og Føroyum. Fyritøkan byrjaði sítt virksemi, í Nuuk, í Grønlandi í 1978. Hetta var í eini tíð, tá tørvurin á fjølbroyttum vøruveitingum til grønlendskar handverkarar øktist.

Tað vísti seg, at serkunnleikin hjá Acrtic Import kom væl við, og skjótt fevndi virksemið so víða, at neyðugt varð at útbyggja og samstundis seta á stovn eina skrivstovu í Danmark, til at røkja teirra áhugamál. Danska skrivstovan varð løgd soleiðis, at møguleikarnir at koma til flogvøllin í Aalborg og til Grønlandshavnina vóru so góðir sum gjørligt. So við og við er hendan skrivstova vorðin høvuðssæti í virkseminum hjá fyritøkuni.

Í 1999 byjaðu teir við Arctic Import Føroyar, og settu ein staðbundnan sølumann í Føroyum. Síðan tá hevur tað bert gingið framá hjá Arctic Import Føroyar, sum hevur fingið nógvar fastar kundar, bæði almennar stovnar og privatar fyritøkur. Umframt Willi Olsen, sum er í Føroyum, eru eisini tvey føroysk starvsfólk á deildini hjá Arctic Import í Nørresundby. Talan er um Anniku Jacobsen og Finnbjørg Jacobsen.

Týsk ferðaskrivstova:

# Fótbólturin ger Føroyar kendar



*Solveig Mohrhof saman við teimum 15 ferðafólkunum, sum vóru her á vitjan*

*mynd: Jens K.Vang*

**Solveig Mohrhof frá týsku ferðaskrivstovuni Nord-Nordost Reisen, sum vitjaði her við 15 týskum ferðafólkum, sigur at Føroyar er eitt vakurt og annarleiðis land at ferðast í, men oyggjarnar eru ov lítið kendar í Týsklandi**

FERÐAVINNA
*Magnus Gunnarsson*

Mánadagin kom eitt týkst ferðalag við Norrønu. Tað er týska ferðaskrivstovan Nord – Nordost Reisen, nærhendis Flensburg, sum skipar fyri ferðini. Hendan ferðaskrivstova, ið er 28 ára gomul, skipar vanliga fyri ferðum til Grønlands, Svøríkis, Danmarkar, Ruslands og Baltisku londini. Seks tey seinastu árini hava tey skipað fyri ferðum til Íslands. Nú komu tey so ein royndartúr til Føroyar við 15 ferðafólkum.

Tað er danska Solveig Mohrhof saman við manninum, Rydiger Mohrhof, sum reka ferðaskrivstovuna. Solveig hevur búð í Týsklandi seinastu 40 árini. Hon er sjálv ferðaleiðari á hesi ferðini, hon sigur at Føroyar er eitt sera vakurt og annarleiðis land at ferðast í, men hon heldur, at oyggjarnar eru ov lítið kendar í Týsklandi. Men hon heldur samstundis, at t.d.fótbóltsdysturin í komandi viku kemur at bøta munandi upp á tað, tá nógvir týskarar koma higar. Solveig hevur einaferð fyrr verið í Føroyum fyri umleið 20 árum síðan. Tá komu tey við DFDS ferðamannaskipinum Winston Churchill.

Týsku ferðafólkini vóru fleiri útferðir meðan tey vóru her, mánadagin koyrdu tey við einum bussi hjá Toru Tourist Traffic, tá vóru tey m.a. á Frímerkjadeildini á Arjum, har tey fingu týskar faldarar um føroysk frímerki.

Ferðalagið fór víðari við Norrønu til Íslands í dag. Næsta ár er so ætlanin at koma aftur hendan vegin.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Hesar hava fingið prógv sum Heilsuhjálparar í 2003



*Aftast frá vinstru: Elsa Nielsen Sørvágur, Rúna Sørensen Trongisvágur, Elsa Poulsen Tórshavn, Ása Olsen Tórshavn, Gurli Svartá Saksun, Olina Berg Skála, Marita Jacobsen Klaksvík, Aslai Højgaard Rúnavík, Randi Djurhuus Hvalvík, Hildegunn Simonsen Klaksvík, Herðfríð Askildsen Tórshavn, Elin Kjærbo Tórshavn, Margaret Johannesen Leirvík.*
*Sitandi frá vinstru: Hanna West Hvalba, Hansa Ziskasen Vágur, Diana Jacobsen Lamba, Jensia Jacobsen Nólsoy, Heiðrún Hansen Skopun, Marianna Antoniussen Klaksvík, Mina Bjartalíð Klaksvík.*

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara kæri pápi, verfaðir og abbi

**Niklas F. Mikkelsen, Syðrugøta**

andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 3. juni 2003, 71 ára gamal.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hósdagin 5. juni kl. 18.00.

Jarðarferðin verður leygardagin 7. juni úr Gøtu kirkju kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Marjun, Eghild, Jórun og Sunrit**

Tey, ið ynskja at minnast Niklas, kunnu geva Gøtu kirkju eina gávu.

## 85 ár

Í dag, 5. juni, fyllir Maria Vang 85 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni um kvøldið heima hjá soninum.

## Dagurin

**5. juni. Grundlógardagur,** hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849. Dagurin ber annars navnið **Bonifacius**. Hann var enskur munkur, sum var tiltikin trúboðari og fekk navnið ápostul Týsklands. 80 ára gamal varð hann saman við 52 øðrum myrdur av heidningum í Frísalandi hvítusunnudag í 754.

*Jákup Dahl varð føddur henda dag í 1878 og deyður í 1944.*

## Janus Petersen í Vestmanna 75 ár



Hósdagin 5. juni verður Janus Petersen í Vestmanna 75 ár. Janus er føddur og uppvaksin í Kollafirði, sonur Onnu Katrinu, f. Joensen, og Emil Petersen, bæði úr Kollafirði. Hann er nummar fimm í rekkjuni av 13 systkjum. Sum ungur var hann í Íslandi, har hann arbeiddi á einum bóndagarði og róði út. Hann sigldi eisini við føroyskum fiskiskipum. Í 40-unum koyrdi hann hýruvogn í Havn hjá Magnus Bærentsen og í Taxa.

Hann giftist í 1955 við Elisabeth, f. Sørensen (1929-1973), ættað úr Porkeri. Tey búsettust í Kollafirði og fingu trý børn: Bjarna, Annu og Hjørdis.

Áðrenn hann giftist við Elisabeth, átti hann sonin Kára Millum Garðarnar, úr Klaksvík.

Hann er eisini kendur sum Janus í Bindibókini, tá hann stóð sum model í føroyskum troyggjum í tí føroysku bindibókini.

Janus er skiparalærdur, og var hann skipari og partaeigari í línubátinum Eiriki Jalli, sum varð bygdur í Sagvåg í Norra í 1962. Hann sigldi eina tíð hjá donskum reiðarií. Hann var eisini skipari og partaeigari í farmaskipunum hjá Star.

Konan, Elisabeth, doyði í 1973. Í 1984 giftist Janus giftist við Annefíu, f. Nicolajsen, úr Vestmanna, tey búgva í Vestmanna og eiga dóttrina Elisabeth.

Frá 1983-95 sigldi Janus sum skipari hjá Strandfaraskipum Landsins, fyrst um Vestmannasund og í nógv ár sum skipari á Ternuni um Leirvíksfjørð. Síðan hann gavst hjá Strandferðsluni, hevur hann verið onkran túrin við Artic Viking, sum sonurin Bjarni førur.

Janus er tjóðskaparsinnaður maður og er aktivur limur í Tjóðveldisflokkinum.

Hóast Janus nú fyllir 75 ár, er hann sera virkin, hann spælir fótbólt, rør út, hevur dunnur og seyð. Ætlanin var at halda føðingardagin, men vegna verkfallið er hann burturstaddur.

35 ára útsøla

Í samband við at 35 ár eru liðin síðan Vatnsoyra Snikkaravirki byrjaði, vilja vit selja 135 vindeygu og hurðar rættuliga bíliga.

Vit hava sett 4 ymisk tilboð upp, sum øll vísa á talið 35, sí niðanfyri:

1. Vit selja nøkur stk. fyri kr. 35,-
2. Vit lata 65% í avsláttri so vit hava 35% eftir
3. Vit lata 35% avsláttur av nøkrum stk.
4. Vit selja nøkur stk. fyri kr. 35hundrað

Far inn á heimasíðu okkara www.h-window.fo og hygg eftir útsølulistanum.

Vatnsoyra Snikkaravirki pf.